# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Varaleiðarar til Bráðdeildina G1

Hevur tú hug at verða við til at mynda eina spennandi og avbjóðandi deild, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her.

Vit søkja eftir varaleiðarum fulla tíð til setan 1. november 2008 ella eftir avtalu:

- einum til intensiv og viðrakning
- einum til skaðastovu, bráðmóttøku og kommunulæknaskipanina

Bráðdeildin hevur fleiri ymiskar funksjónir, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**

- faklig menning av deildini saman við deildarleiðaranum
- virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstaddur
- verða við í klinisku røktini.

**Krøv til umsøkjaran:**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólki
- hollan fakligan førleika innan intensiv og viðrakning og/ella bráðmóttøku, skaðastovu og sjúkrarøkt
- góð samstarvsevni
- sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og framsíggin
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða:**

- innleiðslu
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum
- ávirkan á fakliga menning
- fakliga dugnaligar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan leiðslu og serøkini á deildini. Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Jórun Højgaard, deildarleiðara á tlf. 304500, lok. 5811, t-post lsjorho@ls.fo ella Hergerð Heldarskarð, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á Bráðdeplinum, lok. 5701, t-post lsherhe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 13. oktober 2008 kl. 12.00**

## Avloysari fyri ergoterapeut

Ein av okkara ergoterapeutisku starvsfeløgum fer í farloyvi í eitt ár og tí søkja vit eftir avloysara fyri hana. Starvið er 30 tímar um vikuna og er frá 1. november 2008 til og við 30. oktober 2009.

Við leiðandi ergoterapeutinum eru vit 3 ergoterapeutar. Vit arbeiða bæði sentralt í Ergoterapiini einsvæl sum úti á seingjardeildunum. Vit nýta COPM sum fatanargrundarlag og arbeiða miðvíst við at menna dokumentatiónina.

**Ergoteraeputiska virksemið umfatar:**

- venjing av innløgdum sjúklingum, í høvuðsheitum apoplexi
- venjing av ambulantum sjúklingum, í høvuðsheitum hondkirurgi
- vegleiðing av sjúklingum og avvarðandi um tørv á broytingum í heiminum

**Vit kunnu bjóða:**

- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Vit leggja dent á persónligar eginleikar sum greiða talu, humor og fleksibilitet.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turið Jacobsen, leiðandi ergoterapeut á tlf. 304500, lokal 5781 ella email lsturja@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 10. oktober 2008 kl. 12.00**

## Goymsluleiðari

Eitt spennandi og mennandi fulltíðarstarv sum innkeyps-, sølu- og goymsluleiðari er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Leiðarin hevur ábyrgd av øllum innkeypi til Landssjúkrahúsið, og at avtalur verða gjørdar við veitarar í Føroyum og uttanlanda. Leiðarin skal verða við til at menna eina strategi, sum styrkir Landssjúkrahúsið yvirfyri veitarum og mennir okkara sølulið. Somuleiðis skal raksturin av Goymsluni mennast.

Goymslan er saman við Føroya Gjaldstovu í ferð við at seta eina nýggja telduskipan í rakstur. Skipanin er grundað á ORACEL og tengd at Búskaparskipan Landsins. Leiðarin skal verða við til at innkoyra hesa skipan og áhaldandi menna hana.

Goymslan hevur umleið 7.000 ymiskar vørur og umsitur fyri umleið 20 milliónir krónur um árið.

Hon umsitur innkeyp/móttøku/sølu/uppfylling á deildunum á Landssjúkrahúsinum, sølu til Klaksvíkar- og Suðuroyar sjúkrahús, røktarheimini, bústovnarnar, heimarøktina og onnur viðskiftafólk innan heilsuverkið.

Tað starvast í løtuni 9 starvsfólk á Goymsluni.

**Førleikakrøv:**

- útbúgving og royndir innan innkeyp, goymslu- og vørustýring
- hollar leiðsluroyndir og royndir innan strategiskt arbeiði
- edv-kunnleiki á víðkaðum brúkarastøði (egin oracelskipan verður nýtt)
- kunna orða seg á donskum og enskum í talu og skrift
- royndir við sáttmálasamráðingum
- kunnleiki til sjúkrahúsvørur er ein fyrimunur

**Eginleikar:**

- góður røkjuskapur og analytiskar gávur
- góð samstarvsevni og evni til at útbýta arbeiðsuppgávur
- duga at stinga út í kortið og selja ein boðskap
- duga at síggja møguleikar fram um forðingar
- positiv/ur við tænastusinni
- halda høvdið kalt og renna skjótt, tá tað er neyðugt

**Vit kunnu bjóða:**

- eitt spenandi starv, sum tú sjálv/ur hevur ávirkan á
- góðar samstarvsfelagar og góð og dugnalig starvsfólk
- neyðuga upplæring og vørukunnleika

Landssjúkrahúsið arbeiðir við at fáa fastlagt leiðaraviðbótina á einum støði, sum samsvarar við krøvini til starvið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðrið Ellefsen, leiðara á goymsluni á tlf. 304599, lok. 1163, t-postur lsgurel@ls.fo ella til Jan á Argjaboða, depilsleiðara á Tænastudeplinum, tlf. 212337, t-postur lsjanar@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. oktober 2008 kl. 12.00.** Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði.

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum

(sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B7**
Umsóknarfreistin er 29. september 2008 kl. 12.00

**Endurlýsing – Sosialráðgevi til Psykiatriska depilin**
Umsóknarfreistin er 3. oktober 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo